**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI EIRARGARÐ**
SB_Tórshavn_Eirargarður_2025_2026

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

**§1. ØKI SAMTYKTARINNAR**

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta fylgiskjali 1, og fevnir um part av matr. nr. 1000a og 1010u, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir ella samanlagdir nevndu ogn.

**§2. ENDAMÁL OG HEIMILD**

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa høga bústaðabygging í økinum.

Stk. 2. Økið liggur í umráðisparti A2, sum sambært almennu byggisamtyktini er ætlað húsum í fleiri hæddum til bústaðabygging.

Stk. 3. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

**§3 NÝTSLA ØKISINS**

Stk. 1. Økið skal nýtast til høga bústaðabygging, umframt fríøki og felags hentleikar til íbúgvar, sí vegleiðandi fylgiskjal 2.

Stk. 2. Byggivaldið kann geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum. Virksemi skal kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

**§4. BYGGING OG STØDD HÚSANNA**

Stk 1. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,25.

Stk. 2. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,8.

Stk. 3. Hús skulu ikki vera hægri enn 15 m til hægsta punkt við útvegg og 18 m til mønuna.

**§5. VEGIR OG PARKERING**

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Stk. 2. Parkeringspláss verða skipaði sum partur av eini heildarloysn fyri sjúkrahúsøkið.

Stk. 3. Inntriv í økið skulu gerast við virðing fyri hagalendinum kring bygningarnar.

## §6. ÚTSJÓND

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §7. BYGGING IÐ ER

Stk. 1. Hendan byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

## §8. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §9. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU- OG ORKUMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr: | 25/08573 |
| Ætlanarskriv: | |
| Góðkent: | 4/5-2026 |
| Váttað: | |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 1 | | | | |
| **Mát** | 1:1500 | | | | |
| **Dagur** | 24.09.2025 | **Journal** | 25/08573 | **Teknað** | RVH |



**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Eirargarð | | | | |
| **Undirheiti** | Fylgiskjal 2 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 24.09.2025 | **Journal** | 25/08573 | **Teknað** | RVH |